# Súrur Kezman fekk leikbann

Álopsspælarin Meteja Kezman var súrur, tá hann varð skiftur út í farnu viku. Kezman spælir fyri Paris St. Germain, og tá liðið var aftanfyri 3-0 ímóti Bordeaux , var Kezman skiftur út. Hann tveitti troyggjuna frá sær í illsinni, og tað kostar honum nú leikbann frá felagnum. Kezman sleppur ikki upp í part næstu tvær vikurnar, og tað kostar honum millum annað ein UEFA Cup dyst.



# DBU stórt hall

Danska fótbóltssambandið hevði stórt hall í seinasta roknskaparári. Heilar 14,1 millión krónur vóru í halli, og DBU sigur, at orsøkin er, at fótbóltssambandið hevur lagt nógva orku í talentmenning, og harafturat eru minni inntøkur frá landsliðnum, tí úrslitini hava ikki verið nóg góð. - Bara dysturin ímóti Íslandi gav eina millión krónur minni í inntøkum, tí vit ikki longur kundu spæla okkum víðari til endaspælið, sigur DBU í frágreiðing til roknskapin.

# í myndum





*Fyri fyrstu ferð síðani 1998 stóð Kyndil við silvurmerkjum eftir eina mansfinalu*

Mynd: Álvur Haraldsen



*Karl Oddmar Rasmussen er mest royndi av lokalu spælarunum hjá Neistanum, so sjálvandi varð hann maðurin, sum skuldi upp eftir steypinum*

Mynd: Álvur Haraldsen

*Nærdystirnir vóru nógvir. Her hevur Birgir Poulsen gott tak á Bárði Johannesen*

Mynd: Álvur Haraldsen





*Høllin var stúgvandi full av áskoðarunum, og hesir gjørdu sítt til at seta sannan veitsluróm á dagin*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Brúktu øgiliga orku

**Hans Áki Dal-Christiansen iðraði seg sjálvandi um tapið móti Neistanum, men hann noktaði at geva nøkrum skuldina fyri hesum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Tapið í steypafinaluni leygardagin var fyrsta finalutapið hjá Kyndli síðani 1998, og tá verða bæði steypa- og FM-finalur taldar við.**

**Meira enn aðrir hava teir grønu víst, at teir eru eitt satt finalulið, og tí var iðranin um tapið kanska eisini størri, enn hon vanliga er hjá øðrum liðum.**

**- Tað er somikið langt síðani, at vit hava tapt eina finalu, at tað passar næstan ikki, segði Hans Áki Dal-Christiansen eftir dystin.**

**- Men vit brúka øgiliga nógvar kreftir í dag. Vit eru aftan fyri við fimm málum eitt skifti, og vit brúka øgiliga kreftir fyri at vinna okkum aftur í dystin. Og so er tað serstakliga tungt at halda fast.**

***Tit misnýta brotskast, tá tað stendur 20-20 og so sjálvandi aftur, tá tað stendur 27-26?***

**- Ja, tað er sjálvandi dýrt. Men tú kanst ikki geva einum brendum brotskasti skyldina fyri, at tú tapir. Tað er ein ræðulig støða hjá Bárði at standa í, tá tú brennir brotskast í seinastu sekundunum, men hann skal so ikki hoyra eitt ilt orð fyri tað. Bárður spældi ein fantastiskan dyst fyri okkum í dag, segði Hans Áki Dal-Christiansen eftir dystin.**